B36-HB:

# Ársins dystur

Heðin á Lakjuni skeyt avgerandi málið fyri tveimum árum síðani móti HB. Sjálvur hevur hann einki ímóti eini endurtøku, men fyrst og fremst er tað sigurin, sum telur, heldur hann



Rógvi Jacobsen hevur seinnu kappingarhálvu verið fastur fúsur í álopinum, og á máltindinum hevur hetta eisini givið úrslit í fleiri málum. Og ætlanin er í øllum førum at leggja okkurt afturat sunnudagin



**Einki er at ivast í, hvar størsti áhugin er sunnudagin. Slagið um Havnina er slagið um gullið. Hvørki meira ella minni**

GULLBRAKIÐ
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fyri nógv er kanska bara talan um eitt vanligt hóskvøld seinast í september mánaði. Eitt septemberkvøld sum av álvara boðar frá, at heystið nú er ávegis. Talan er kanska ikki um tann nógva vindin, men kuldin boðar frá, at summarið er ein farin tíð.

Fyri teir mongu fótbóltsleikararnar, sum hetta kvøldið tuska á graslíkinum í Gundadali, er talan tó ikki bara um eitt vanligt kvøld. Talan er nevnliga um teir báðar fyrstudeildarhóparnir hjá havnarfeløgunum báðum, HB og B36, og kvøldið er næst seinasti parturin av fyrireikingunum til størsta dystin á árinum. Ja, kanska tann størsti dysturin millum tvey føroyk fótbóltsfeløg í fleiri ár. Fyri fyrstu ferð í nærum 40 ár hevur kappingin lagað seg soleiðis, at bæði havnarfeløgini standa við FM-avgerðini í hondunum, og eftir øllum at døma er sunnudagurin dagurin, tá avgerðin fellur, hvør av teimum tað verður, sum fer avstað við gullinum, heiðrinum og – ikki minst – milliónaupphæddini hjá UEFA.

Og liðini eru væl fyri bæði. Eingir skaðar og eingi leikbann gera um seg, so mest av øllum, so tykist tað vera ein luxus-trupulleiki hjá venjarunum, at onkur leikari má setast á beinkin.

## Spara seg

Og einki er at ivast í, menn eru spentir til dystin. Hóast venjingarnar eru tær somu, sum so ofta verða nýttar, so er sjónligt, at intensiteturin í hesum ikki er so høgur, sum hann hevur fleiri aðrar venjingar á árinum. Við ovara vøll, har HB í kvøld hevur venjingina roynir Frank Skytte at koyra á menninar í einum intervalspæli á lítlum øki, men tað er eyðsæð, at eingin vil taka sær nøkur óráð fyri. Bara tankin um at skula noyðast skaddur av venjingini og eftirfylgjandi síggja stórdystin frá áskoðaraplássunum man vera nóg mikið til at taka broddin av nærdystunum, og við niðara vøll er støðan ikki stórt øðrvísi.

Her hevur Ion fyrst sett menninar at venja álopsstøður. Spælt verður bóltum gjøgnum bæði borðini, og eisini fáa áleypararnir loyvi at fáa bóltar beint á, og so er at royna at fáa mál burturúr. Hóast hetta gevur onkrar nærdystir, so tykjast verjuleikararnir heldur ikki her at leggja ov nógv fyri, og at menn spara seg eitt sindur tykist eisini greitt, tá Rúni Elttør brádliga fer í málið at standa. Frágreiðingin tykist vera, at lærið spentist eitt sindur, og so er best at gevast, meðan leikur er góður.

Ofta verður tikið til, at innsatsurin í venjingunum gjøgnum vikuna speglast aftur í dystunum, men tað er nokk ikki øll søgan hesaferð. Undir kanska heldur spakføra lyndinum á spælinum býr ein spenningur, ið ivaleyst ger um seg hjá hvørjum einstøkum leikara. Ein spenningur, sum er bygdur upp ígjøgnum 16 landskappingarumfør, og sum ikki verður útloystur fyrr enn sunnudagin klokkan trý seinnapartin.

## Verjan skal halda

Venjingin hjá HB er liðug. Flestu leikararnir eru farnir inn, men onkrir teirra eru tó framvegis á vøllinum. Skotið verður til máls, og tað er eyðsæð, at onkrir av skjúttunum helst teljast millum teirra, sum kunnu fáa møguleikan, skuldi tað hent seg, at dómarin brískslar fyri einum frísparki nærhendis B36-brotsteiginum.

Ein teirra er Rógvi Jacobsen, og eftir at seinasta skotið langt um leingi er skotið, fáa vit orðið á hann til eitt stutt prát um frammanfyristandandi uppgávuna.

Og hóast Rógvi nú má roknast sum ein av teimum royndu leikarunum á HB-liðnum, so dylir hann ikki fyri, at sunnudagurin verður ein heilt serligur dagur. Eisini hóast hann við landsliðnum hevur tikist stórar fótbóltstjóðir, og eisini hóast hann undan hesum hevur verið føroyameistari við bæði KÍ og HB.

- Tað er einki at ivast í, at hetta er ein stórur dystur. Ivaleyst er tað tann størsti dysturin nakran tíð fyri bæði okkum og B36. Ein dystur har alt verður avgjørt.

Tað sást kanska eisini á venjingini, at leikarar longu hava tankarnar frammi á sunnudegnum. Í øllum førum var intensiteturin í venjingini ikki so stórur, sum hann kanska átti at verið hjá einum oddaliði?

- Nei. Har verður nokk ikki tacklað so hart i kvøld. Vit mugu undir ongum umstøðum koma í eina støðu, har leikarar verða skaddir undir venjing, og tí ikki eru tøkir til dystin. Hetta er jú dysturin, sum øll hava tosað um, og satt at siga, so spenningurin bara vaksin ígjøgnum vikuna. Nú bíða vit so bara eftir, at dysturin skal blásast ígongd.

Síðani summarsteðgin hevur Rógvi verið í einum heldur óvandum leikluti á HB-liðnum. Heldur enn plássið á miðjuni, har hann hevur verið rimmarfastur, hevur hann seinnu umførini verið upp í álopinum. Ein roynd, sum hevur riggað væl. Fleiri mál eru komin burturúr, og tað tykist ikki vera nakar ivi, tá hann verður spurdur, hvørt okkurt kanska kemur afturat sunnudagin.

- Tað er einki at ivast í, at eg ætli mær eitt ella tvey mál, sigur hann flennandi.

- Nei, tað veit eg ikki. Bara vit vinna, so hevur tað ikki stórvegis týdning, hvussu málini koma.

Og spurdur um uppskriftina til sigurin, so ivast álopsmaðurin ikki í, at hendan skal finnast í verjupartinum.

- Eg trúgvi í øllum førum tí, at um verjan hjá okkum heldur teimum frá málinum, so skal tað nokk ganga. So skulu vit nokk syrgja fyri at fáa okkurt mál í hinum endannum, sigur Rógvi Jacobsen at enda.

## Skulu trýstast

Hóast talan er um dyst millum høvuðsstaðarfeløgini, so verður Rógvi ikki einsamallur klaksvíkingur á vøllinum sunnudagin. B36-megin eru tríggir av slagnum, og eftir venjingina fáa vit orð á Heðin á Lakjuni, sum eftir eitt ár heima í Klaksvík nú er aftur at síggja í B36. Og verður tosað um avgerandi dystir móti HB, so er einki at ivast í, at Heðin hevur góð minni. Tað var í øllum førum hann, sum í fyrraárið tryggjaði B36 gullið, tá hann í næst seinasta umfarinum skeyt einsamalla málið í avgerandi 1-0 sigrinum á HB.

Spurdur um dystin nú sunnudagin, tykist Heðin í fyrstu atløgu at leggja dent á, at hesin ikki er so nógv øðrvísi enn hinir 16 dystirnir, sum eru leiktir í kappingarárinum.

- Tað er ein dystur sum allir aðrir. Vit fara á vøllin fyri at vinna. Tað er tað týdningarmesta.

Men spenningurin upp til hendan hevur tó verið størri enn í øðrum dystum hetta árið?

- Tað er hann sjálvandi. Tað er ein avgerandi dystur, og tí er týdningurin av sigrinum eisini størri, men tað skulu vit eisini klára. Tað er sigurin sum telur, og einki annað.

Og er nøkur serlig uppskrift, sum kann tryggja tykkum sigurin?

- Vit mugu fyrst og fremst royna at trýsta teir í botn. Vit hava gott fólk á liðnum, og spæla allir upp til sítt besta, so ivist eg ikki í, at vit fáa okkurt mál burturúr. Eisin hóast teir hava eina góða verju.

Sum nevnt, so var Heði maðurin, sum fyri tveimum árum síðani skeyt avgerandi málið í seinna dystinum móti HB, og sjálvur hevur hann so einki ímóti, at hetta fer at endurtaka seg sunnudagin.

- Tað hevði í øllum førum verið stuttligt. Tað týdningarmesta er tó, at vit vinna dystin. So er tað líkamikið, hvør stendur fyri málunum, sigur Heðin á Lakjuni at enda.

# Hevur ofta verið spennandi

**Hóast FM-gullið sjálvsagt er málið hjá teimum báðum havnarfeløgunum, so er einki at taka sær aftur í, at ein partur av dystinum sunnudagin eisini er slagið um Havnina. Ein tvídystur, sum hevur verið til eins leingi, sum Havnin hevur havt meira enn tað eina fótbóltsfelagið. Í sambandi við gullbrakið sunnudagin hava vit skeitt eftir, hvussu tað hevur hilnast seinastu tíggju árini, tá grannauppgerðirnar hava verið á skránni**



*Rói Árting og Jan Guttesen hava báðir verið partur av fleri høvuðsstaðaruppgerðum. Men hvørgin teirra verður so við sunnudagin*

GULLDYSTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

**1993**
Báðir dystirnir millum havnarfeløgini enda við javnleiki, 1-1. Fyrra dystin hevur HB leingi munin, men Todi Jónsson javnar fyri B36 móti dystarenda. Seinna dystin er tað leingi B36, sum hevur munin, og tó at HB javnar í seinna hálvleiki, so merkir hetta eitt endaligt farvæl til gullmøguleikan. HB fær silvur hetta árið - trý stig aftan fyri GÍ. B36 endar á fimta plássinum.

**1994**
Stórur munur er á høvuðsstaðarliðunum hetta árið. Fyrra dystin vinnur HB 3-1 á B36, sum fram til hetta var oddalið í deildini. Seinna dystin verður eitt kreppurakt B36 offur fyri sannari eyðmýking, tá dysturin endar við ikki minni enn 5-0 sigri til HB. Aftur fær HB silvur, tá GÍ í evstu løtu fær javnleik í Klaksvík og harvið vinnur við betri málmuni. B36 endar sum nummar sjey.

**1995**
HB heldur fast um munin millum grannarnar, og í báðum dystunum er talan um stórsigur. Í fyrsta landskappingardystinum á árinum vinnur HB 5-1 á grannunum, sum annars javnaðu til 1-1 í fyrra hálvleiki. Seinna dystin endurtekur søgan seg frá árinum fyri, soleiðis at samlaði sigurin hjá HB hetta árið er 10-1. Triðja árið á rað er talan um silvur til HB. B36 er leingi við í heiðursmerkjastríðnum, men endar á einum fimta plássi.

**1996**
B36 hevur til 60 ára føðingardagin styrkt mundandi um hópin. Fyrra dystin móti hjálpir hetta tó lítið. Tó at B36 leingi roynir at trýsta, so vinnur HB 3-1. Seinasta dystin á árinum fær B36 fyrsta grannasigurin síðani 1990, tá teir vinna 2-0. Við betri málmuni enn grannarnir fær HB tó bronsukrónurnar um hálsin eftir dystin.

**1997**
Fyri fyrstu ferð í 35 ár vinnur B36 FM-gull, men tað tekur nakað av gleðini, at einastu stigini, sum liðið missur hetta árið, eru tey seks ímóti HB. Fyrra dystin vinnur HB 1-0, og í næst seinasta umfarinum er úrslitið 3-2 til HB, men tá er B36 longu meistari. Við 48 stigum setir B36 eisini met fyri bestu føroysku deildina, meðan HB fær silvur við 41 stigum. Men tað er tó merkisvert, at HB hetta árið tapti færri dystir. Bert eina ferðina fór HB av vøllinum við ongum hetta árið.

**1998**
Hesa ferð er tað HB, sum vinnur meistarheitið. Grundin undir hesum varð løgd longu í fyrsta dystinum, tá teir við einsamøllum brotssparksmáli vinna 1-0 á B36. Einasti dysturin, sum HB tapir hetta árið er tann seinni móti B36. Her megnar HB – hóast teir bert spæla við 10 stóran part av dystinum – at koma upp á 2-1, men seinastu løtuna fær B36 tó tvey mál. Við 45 stigum verður HB sum sagt føroyameistari. B36 fær bronsu við 37 stigum.

**1999**
Í nógvar mátar roynist árið illa hjá HB, sum endar á fjórða plássinum í landskappingini. Men tað er tó eitt plástur á sárið, at teir vinna báðar dystirnar á B36. Hin fyrra við 4-2, eftir at B36 annars hevur verið á odda 2-0. Seinna dystin vinnur HB 2-0, og setir við hesum ein álvarsligan støg í FM-hóttanina frá B36. B36 endar árið á fjórða plássinum, trý stig aftan fyri KÍ. HB verður nummar fýra við einum stigi færri enn grannarnir.

**2000**
Í einum kreppuárið hjá B36 tykjast teir úr HB í allar mátar at vera omaná, tá teir fyri summarsteðgin vinna 3-1 á grannunum. Næst seinasta dystin á árinum tykist HB eisini stevna beint ímóti FM, tá teir eru á odda 2-1 í grannauppgerðini. Men í yvirtíðini misnýtir HB brotsspark, og tá B36 so skorar beint eftir hetta gleppur gullið úr hondunum. HB fær silvur við tveimum stigum færri enn VB. B36 verður nummar átta eftir eitt kappingarár, har innanhýsis órógv í stóran mum setti dám á avrikini.

**2001**
Fyri fyrstu ferð í mannaminni vinnur B36 báðar dystirnar á grannunum. Fyrri dysturin endar við einum 2-1 sigri, har B36 seinastu løtuna spælir við níggju monnum. Seinna dystin tryggjar árstalsfelagið sær meistaraheitið, tá Heðin á Lakjuni skjýtur einsamalla málið í 1-0 sigrinum á næst seinasta leikdegi. HB hevur her eitt tað lakasta kappingarárið í felagssøguni, tá teir enda á einum sjeynda plássi.

**2002**
Í fjør stóð púrasta á jøvnum millum grannarnar báðar í innanhýsis uppgerðunum. Fyrra dystin vinnu HB 2-1 við málum frá Jón Róa Jacobsen og Andrew av Fløtum. Jákup á Borg skjýtur einsamalla B36 málið. Seinni dysturin, sum verður leiktur fyrst í august mánaði endar við 2-1 sigri til B36. John Petersen og Egil Zachariasen skjóta málini hjá B36, meðan Andrew av Fløtum skorar fyri HB. Eftir hetta tekur HB sær tó um reiggj, og við sigri í øllum teimum eftirverandi dystunum tryggja teir sær meistaraheitið. B36 er hetta árið niðri á einum fimta plássi.